# Útoyggjastevna úti í Svínoy



*Í ár verður Útoyggjastevnan hildin úti í Svínoy*

**Aðalfundur, kórsangur við Havnarkórinum, útferðir og dansur er bara eitt sindur av tí, sum verður á skránni á Útoyggjastevnuni úti í Svínoy komandi leygardag**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin*

Útoyggjastevan verður hildin á hvørjum ári, har útoyggjarnar skiftast um at vera vertir. Í ár verður stevan hildin úti í Svínoy leygardagin 11. juni, tá árligi aðalfundurin hjá útoyggjafelagnum eisini er á skránni. Aðalfundurin verður í lærarahúsinum kl. 10.30

Kl. 14.00 setur Ólavur Klementesen stevnuna, og restina av degnum verður nógv ymiskt á skránni. Í gamla skúla verður framsýning av gomlum myndum og søguligum lutum úr bygdini, og í Lærarahúsinum verður tunnilsætlanin sýnd fram. Skipað verður eisini fyri gongutúri runt í bygdini, har staðkend fara at greiða frá ymsum áhugaverdum, og høvi verður eisini at fara á útferð út í Árantsholuna.

Eisini Angela og Hannebal fara at leita sær út til Svínoyar at gera okurt spennandi saman við børnunum, og út á kvøldið verður togtogan og bál, har Bjarni Jacobsen fer at halda bálrøðuna. Aftaná verður skipað fyri enskum dansi í Dansistovuni og eisini verður farið uppá gólv uttanfyri.

Tey, ið ynskja at ferðast beinleiðis úr Havn til Svínoyar, verða biðin um at tekna seg við at senda teldupost til utoygg@utoyggj.fo og upplýsa navn og tlf. nummar. Plássið á hesum túrinum er avmarkað. Eisini verða fleiri eykatúrar Hvannasund - Svínoy - Hvannasund silgdir stevnudagin.

### Skráin fyri Útoyggjastevnuna

| | |
|---|---|
| 09.30 - 10.30 | Morgunmatur |
| 10.30 - 12.00 | Aðalfundur hjá Útoyggjafelagnum |
| 12.00 - 13.00 | Døgurði |
| - | |
| 14.00 | Ólavur Klementsen setur stevnuna, felagssangur |
| 14.15 | Hoppiborg o.a. fyri børn |
| 15.00 | Hannibal og Angela undirhalda |
| 15.00 | Breyð- og kaffisøla |
| 10.00 | Framsýning í gamla skúla av gomlum myndum og søguligum lutum úr bygdini |
| 15.00 | Tunnils-ætlanin verður sýnd fram í Lærarahúsinum |
| 16.00 og 18.00 | Kirkjan verður sýnd fram, Heri Joensen, prestur, greiður frá, Í kirkjuni verður Kórsangur v/Ólavur Hátún og havnakórinum |
| 15.00 - 16.00 | Húsini úti í Bø verða víst fram |
| 14.30 | Útferð út í Árantsholuna |
| 17.00 | Frásøgn um Skotaskipið og onnur søgulig støð í bygdini Óli á Geilini og Símun Hansen greiða frá |
| 20.00 | Togtogan millum útoyggjarnar |
| 21.00 | Bál í fjørðuni og felagssangur. Bálrøðari: Bjarni Jacobsen |
| 22.30 | Føroyskur og enskur dansur í og uttanfyri Dansistovuna |

# Ung í Føroyum í Sørvági

**Vikuskiftið 9-10. september verður aftur skipað fyri Ung í Føroyum stevnu uttan fyri høvuðsstaðarøkið. Tá stendur Ung í Føroyum Vestur á skránni og stevnan verður hildin í Sørvágs skúla**



*Rakel Helmsdal og Hedvig Westerlund-Kapnas eru verkætlanarleiðarar hjá Ung í Føroyum*

UNG Í FØROYUM
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyrr í ár varð á fyrsta sinni skipað fyri Ung í Føroyum uttan fyri høvuðsstaðarøkið, tá 40 ung úr øllum landinum savnaðust á stevnu í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. 9.-10. september skipa so kommunurnar í Vágum í samstarvi við Norðurlandahúsið og Mentamálaráði fyri Ung í Føroyum stevnu í skúlanum í Sørvági.

### Verksmiðjur og framsýningar

Tiltakið byrjar fríggjadagin við innahýsis framførslum og framsýningum, har tey ungu vísa eitthvørt listarligt avrik, tey hava við sær.

Leygardagin arbeiða tey ungu í listaverksmiðjum í Sørvágs skúla. Í Ung í Føroyum Vestur verða verksmiðjurnar »Sjónleikur« við Mikkjali Helmsdal, »Orð og mynd -bókin sum listaverk« við íslendska rithøvundanum og myndprýðaranum Áslaug Jónsdóttir, »Tónleikur -uttan streym« við Sámali Ravnsfjall og Katrini Jørgensen og »Dansur« við Jónu Thomsen.

Leygarkvøldið frá kl. 18:00 til 19:00 verða verksmiðjurnar opnar. Tá hava øll áhugað høvi til at síggja, hvørjum tey ungu arbeiða við og hvussu. Listaframsýningin, sum ungdómurin hevur við sær, verður opin fyri almenninginum í eina viku eftir stevnuna.

### Varpa ljós á ungdómsmentan

Ung í Føroyum er ein lista- og mentanarstevna fyri ung frá 13 til og við 18 ár. Umframt at geva luttakarunum høvi at sýna fram egin listaverk – myndlist, palllist o.s.fr. – verður arbeitt í ymiskum verksmiðjum leiddar av yrkislistafólki. Stevnan hevur til endamáls at varpa ljós á ungdómsmentan og at skapa umstøður til tey ungu at sýna fram og menna listarliga virksemið, sum tey hava áhuga fyri.

Stevnan varð hildin á fyrsta sinni í Norðurlandahúsinum í 2001 og hevur síðani verið hildin í 2003 og 2004. Hon hevur fingið sera góða undirtøku øll árini, har umleið 60 ung eru sloppin við hvørt ár.

Verkætlanarleiðarar eru Hedvig Westerlund-Kapnas og Rakel Helmsdal. Eisini eru ungdómar, sum hava tikið lut á Ung í Føroyum stevnum undanfarin ár, nú vorðin partur av fyriskipanarbólkinum

Meira fæst at vita á um Ung í Føroyum á www.ungiforoyum.info.

# Skúlaøkið í Kollafirði tvífaldað

**Nú enn ein nýbygningur til Kollafjarðar skúla varð reistur fríggjdagin, er samlaða økið hjá skúlanum tvær ferðir størri enn tað, lærarar og nætningar húsast í í løtuni**



*Við nýggju bygningunum verður samlaða fermetratalið hjá Kollafjarðar Skúla tvífalt so stórt, sum tað var frammanundan*

NÝBYGGING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin var móttøka í fimleikarhøllini í Kollafjarðar Skúla, i sambandi við at enn ein nýbygningur til skúlan varð reistur. Saman við tilbygninginum, sum var liðugur fyrr í ár, er samlaða fermetraøkið hjá skúlanum sostatt nú meir enn tvær ferðir størri enn tað, skúlin hevur húsast í higartil.

Tað er byggifyritøkan Byggitek í Havn, sum hevur staðið fyri arbeiðinum við at víðka um skúlan í Kollafirði. Arbeiðið byrjaði í august í fjør, og hóast tað varð nakað darvað av ringum veðri í desembur, sær tíðarætlanin út til at halda. Eftir ætlan skulu nýggju bygningarnir takast í brúk í august í ár, tá tilbygningurin, sum skal brúkast sum samkomuhøll, eisini verður bundin saman við ítróttarhøllina.